## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Røktarheimið á Mørkini, Streymnes:

# Snotiligt røktarheim til 32 búfólk

**Fríggjadagin 10. februar var móttøka í nýggja røktarheiminum hjá Sunda kommunu í Streymnesi. Eitt snotiligt røktarheim til 32 búfólk**

MÓTTØKA
*Myndir Jens Kristian Vang*

Umleið 500 fólk vóru til móttøkuna í snotuliga bygninginum, ið hevur fingið navnið Røktarheimið á Mørkini. Røður vóru hildnar av t.d. Jógvan Mørkøre í Hósvík, formanni í bygginevndini, Heðin Zachariasen, borgarstjóra í Sunda kommunu, Albert Isfeld arkitekti, Tordur Niclasen, bygdaráðsformanni á Eiði, og Mary í Garði, sum stendur fyri heimarøktini og serforsorgini. Millum politikararnar sum hildu røðu vóru Annfinn Kallsberg, Jørgen Niclasen og Páll á Reynatúgvu.



*Sonja Klein (v.m.), økisleiðari í heimarøktini, og Annika Vágsheyg, leiðari á Røktarheiminum á Mørkini*

Tað eru arkitektarnir Albert Isfeld og Gudmund Hansen, sum hava teknað røktarheimið, ið er 2.440 fermetrar til støddar. Pláss er fyri 32 búfólkum í fýra eindum á 8 fólk. Bygningurin er í einari hædd.

Umframt at hvør eind hevur sín egna køk, er eisini ein felagskøkur, har møguleiki er til at gera døgurðar til heimabúgvandi eldri fólk. Rúm er eisini til ergo- og fysioterapi.

Arkitektarnir hava lagt serligan dent á, at bygningurin skal falla væl inn í landslagið, og at alt er gjørt liðugt uttanfyri.

Ráðgevarar hava verið sjúkrarøktarfrøðingarnir Idu Sørensen og Sonja Klein. Í sambandið við køkin hevur Petra Jespersen, økonoma á Lágargarði verið ráðgevi.

Byggiservice/Articon hava staðið fyri byggingini. Arbeiðið hevur gingið væl og bygningurin varð liðugur áðrenn ta ásettu tíðina. Samlaði kostnaðurin er mettur til 35,5 mió. krónur uttan mvg.

Annika Vágsheyg í Klaksvík er sett sum leiðari á heiminum. Hon byrjar 1. mars, og fyrstu búfólkini flyta inn 1. apríl.



*Pláss er fyri 32 búfólkum á Røktarheiminum*



*Heðin Zachariassen (h.m.) er borgarstjóri í Sunda kommunu*



†

## Andlát og jarðarferðir

**Jallgrím Poulsen**, Sandvík, andaðist mikudagin 15. februar, 73 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi sunnudagin kl. 17. Jarðarferðin verður mánadagin kl. 13 úr Sandvíkar kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

**Eileen Thomsen**, Lopra, fer til gravar úr Vágs kirkju í kirkjugarðin á Leiti leygardagin kl. 13.30.

**Heri Hartmann Niclasen**, Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin 15. februar, 60 ára gamal. Farið verður úr kapellinum leygardagin kl. 17.00 í Tvøroyrar Kirkju. Jarðarferðin verður úr Tvøroyra Kirkju sunnudagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Hera, kunnu lata eina peningagávu; konta í Føroya Banka.

**Jarmund Joensen**, Klaksvík, ættaður av Hvítanesi, andaðist mikudagin í Keypmannahavn. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Betrea Jacobsen**, Miðvágur, fer til gravar úr Miðvágs kirkju leygardagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Betreu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Sanna Herdalur**
í Hovi

fødd Hovgaard, andaðist mikudagin 15. februar á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 95 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Suðoryar Sjúrkahúsi til Smyril leygardagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður mánadagin kl. 13.00 úr Kirkjugarðskapellinum í Havn.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jonhard, Karin og Sólbjørg**

Tey, ið vilja minnast Sonnu við blómum ella kransi, kunnu lata Suðoryar Ellis- og Røktarheimi eina gávu, konta í Føroya Sparikassa.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hans M. Reinert**
ættaður úr Syðradali, búsitandi í Hoyvík

andaðist í heiminum mikudagin 15. februar, 62 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Myrna**

*Tey, ið ynskja at minnast Hans kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Sparikassa nr. 149.410.6.*